LM-055/2023

Fylgiskjal 5

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Fíggjarmálaráðið
Postbox 2039, Tinganes
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 23. november 2023
J. nr.: 23/22630-2
Viðgjørt: AáH
Tygara skriv: 23/16310

Hoyringsviðmerkingar til broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald – grønar hitaloysnir

Umhvørvismálaráðið takkar fyri høvi at gera viðmerkingar til uppskotið um endurgjald fyri meirvirðisgjald til íløgur í elriknað hitapumpuskipan til upphiting av bygningum.

Umhvørvismálaráðið tekur undir við átakinum at geva fult endurgjald í 2024 og tekur eisini undir við at útjavna stigvísu niðurlaðingina árini 2025-2027, tó við tí fyrivarni, at kemur stígur í orkuskiftið innan upphiting av bygningum orsaka av hesum, so er ynskiligt at málið verður tikið uppaftur til politiska viðgerð.

Umhvørvismálaráðið ger vart við, at ætlaðu broytingarnar í § 3d, stk. 1 eisini mugu elva til broytingar í § 3d, stk. 3, har tíðarfreistir og treytir eru ásettar. Eitt nú mugu árstølini broytast.

Harumframt ynskir Umhvørvismálaráðið, at ein nýggj treyt verður sett inn í § 3d, stk. 3. Treytin skal setast fyri at tryggja, at brúktur oljufýringsútbúnaður ikki fer í umfar til onnur at brúka, tá lagt er um til elriknað upphiting við stuðuli úr landskassanum. Hetta krav fevnir bert um oljuupphitaði hús og bygningar, sum leggja um til elriknað hitapumpuskipan.

Ítøkiliga skal ein treyt ásetast í § 3d, stk. 3, sum krevur at ein móttøkuváttan frá IRF ella KB skal leggjast við umsóknini um afturbering av mvg-útreiðslum. IRF og KB eru garantar fyri, at oljufýringsútbúnaðurin fer til upphøggingar.

Nýggja ásetingin í § 3d, stk. 3 kann verða nakað soljóðandi:
Sum nýtt § 3d, stk. 3, nr. 2) verður ásett:
"2) móttøkuváttan frá IRF ella KB um burturbeining av oljufýringsútbúnaði fylgja við umsóknini, tá talan er um uppsetan av hitapumpuskipan í hús og bygningar, sum áður hava brúkt oljufýringsútbúnað til upphiting,"
§ 3d, stk. 3, nr. 2-5 verða eftir hetta nr. 3-6.

Viðmerkingar:
Við ásetingini gerst greitt, at landskassin bert veitir endurgjald fyri útreiðslur til mvg eina ferð til hvørt hús ella bygning, sum leggur um frá olju til el og at umsøkjarar skulu skjalprógva, at oljufýringsútbúnaðurin er latin IRF ella KB til burturbeiningar. Á henda hátt verður tryggjað, at oljufýringsútbúnaðurin er tikin úr nýtslu med alla. Onki endurgjald verður heldur latið fyri útreiðslur til mvg í teimum førum, tá ein elrikin upphitingarskipan verður umvæld, skift út el.tíl.

LM-055/2023

Umhvørvisstovan umsitur saman við TAKS skipanina við afturbering av útreiðslum fyri mvg til stovnsetan av hitapumpuskipan til upphiting av húsum og bygningum. Skipanin við afturbering av mvg-útreiðslum til góðkendar hitapumpurskipanir, fremur átak 13 í samtyktað orku- og veðurlagspolitikkinum.

Vegna Umhvørvismálaráðið,

Anni á Hædd